# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 08.07.2022

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um grind og annan smáhval (Grindakunngerðin)**
(Møguleiki fyri bráðfeingis banni og áseting av mest loyvdari veiðu av skjórutum springara)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 9 frá 26. januar 2017 um grind og annan smáhval (Grindakunngerðin) verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 7, stk. 1, § 22, § 49, stk. 2 og 3 og í § 51, stk. 3 verður "Náttúrugripasavninum" broytt til: "Havstovuni" og í § 25, stk. 1 verður "Náttúrugripasavnið" broytt til: "Havstovan".

**2.** § 12 verður orðað soleiðis:

"**§ 12.** Landsstýrismaðurin kann loyva sýslumanni at lýsa bráðfeingis bann fyri grindadrápi í ávísari hvalvág í upp til 3 mánaðir, um nóg mikið av grind er í grindaumdøminum, sum hoyrir til hvalvágna. Bráðfeingis bann skal lýsast í Kringvarpi Føroya."

**3.** Í § 50 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Loyvt er at taka og veiða í mesta lagi 500 skjórutar springarar hvørt álmanakkaár í 2022 og 2023. Frá 2024 verður veiðan ásett eftir tilmæli frá NAMMCO um burðardygga veiðu."

**4.** Í § 52, stk. 1 verður aftan á "§ 25, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2" sett: ", § 50, stk. 2".

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Árni Skaale**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert